# Nýggi Smyril dregur út



*Smyril syngur nú sín svanasong. Men enn er tað rættiliga óvist, hvussu avloysarin fer at síggja út*

**–Tað er rættiliga óvist um tað nýggja suðuroyarskipið verður tað, sum Strandferðslan hevur skotið upp í samráð við suðuroyingar**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Tað dregur út hjá landsstýrinum at taka støðu til, hvussu tað nýggja suðuroyarskipið skal síggja út.

Í øllum førum er tað rættiliga óvist um tann nýggi Smyrilin verður tað skipið, sum nevndin hjá Strandferðsluni, ið hevur fyrireikað bygginginа, hevur mælt til.

Í nevndini hjá Strandferðsluni, sum fyrireikar bygginginа, hava eisini umboð fyri kommunurnar og vinnulívið í Suðuroynni, sitið.

Eftir at nevndin hevur arbeitt við málinum í meiri enn eitt ár, hevur Strandferðslan lagt eitt tilmælið fyri landsstýrismannin í Vinnumálum, Bjarna Djurholm, um, hvat skip skal byggast.

Hvørki Strandferðslan, ella landsstýrismaðurin í vinnumálum, vilja siga nakað um, hvat skip mælt verður til at byggja.

Men tað skilst á ymsum keldum, at Strandferðslan hevur hugsað nógv um, at tað skal bera til at fáa túratalið upp, tí júst túratalið verður mett at hava avgerðandi týdning fyri livilíkindini í Suðuroynni framyvir.

Tí er tilmælið til Bjarna Djurholm, at byggjast skal eitt skip, ið siglur 21 míl. Eitt slíkt skip kann sigla upp til fýra ferðir ímillum Havnina og Suðuroynna um dagin, um tað skuldi blivið neyðugt.

Men tað er eisini soleiðis við skipum, at skal sum mest fáast burturúr, er støddin rættiliga neyvt tengd at ferðini, skipið skal sigla. Og eitt skip, sum siglur 21míl, verður góðar 130 metrar langt. Eitt slíkt skip kostar 300 milliónir krónur.

Øll hava tó ikki verið so fegin um hetta uppskotið og tí er Strandferðslan biðin um at gera fleiri uppskot um skip í ymsum støddum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, vil ikki siga, hvat tilmælið hann hevur lagt fyri landsstýrið. Men keldur hava upplýst fyri okkum, at hann hevur mælt landsstýrinum til at byggja eitt skip, sum siglur 19 míl og sum er einar 115 metrar langt. Eitt slíkt skip kostar um 275 milliónir.

Málið hevur nú ligið í landsstýrinum í einar tríggjar vikur, men enn er ongin avgerð tikin.

Ongin vil siga nakað serligt um málið, men tað skilst á øllum brøgdum, at landsstýrislimir eru ójavnir á málið um, hvat skip skal byggjast.Tí er tað rættiliga óvist, hvussu skipið fer at síggja út.

Teir suðuroyingarnir, sum hava sitið í fyrireikingarnevndini, hava sett rættiliga hart uppá, at skipið, sum skal byggjast, skal vera tað, sum Strandferðslan hevur mælt til.

Teir síggja hetta nýggja skipið sum lívæðrin a hjá Suðuroyingum og teir halda, at tað er altavgerandi at hava eitt skip, sum lyftir samferðsluna til meginøkið upp á eitt væl hægri støði, enn hon nú er á.

Og sum ein av nevndarlimunum, Viberg Sørensen á Tvøroyri segði.

– Vit hava longu eitt skip, sum kann sigla 19 míl. Tað er ongin orsøk at byggja eitt afturat.

# Í lagi Strandferðslan tekur rúsdrekkaroynd av fólki

**– Eg havi onki ímóti, at Strandferðslan tekur rúsdrekkaroyndir av skiparum og stýrimonnum á strandfaraskipunum, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum**

RÚSDREKKA-POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*

– Eg haldi, at tað er trygdin hjá ferðafólki, manning og skipum, sum hevur alt at siga.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum hevur onki ímóti, at Strandferðslan nú fer at taka rúsdrekkaroyndir av starvsfólkinum.

Hann leggur dent a, at felagið hevur ikki viðgjørt málið og at hetta tí stendur fyri hansara egnu rokning.

Strandferðslan keypti herfyri útgerð at taka rúsdrekkaroyndir av starvsfólkinum við, um illgruni er um, at onkur hevur drukkið.

Ellintur Abrahamsen er samdur við leiðsluna á Strandferðsluni um, at tað er trygdin hjá ferðafólkinum, manningini og skipunum, sum hevur alt at siga.

– Tí fer hann ikki at seta seg ímóti, at rúsdrekkaroyndir verða tiknar av skiparum og stýrimonnum á Strndfaraskipunum.

– Eftir mínum tykki eigur rúsdrekka at verða fullkomiliga bannað í sambandi við arbeiðið. Tí hevði eg ikki á nakran hátt følt tað niðrandi um eg stovnsleiðslan tók eina rúsdrekkaroynd av mær, sigur hann.

Men hann leggur dent á, at alt skal veravið máta.

– Tað kann ikki vera so, at hvør maður skal blása í ballón, hvørja ferð hann fer á vakt, sigur Ellintur Abrahamsen.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, hevur áður sagt fyri Sosialinum, at ætlanin er ikki at taka rúsdrekkaroyndir at starvsfólki í tíð og úrtíð.




*Trygdin er í hásæti. Tí er onki at finnast at, hóast Strandferðslan tekur rúsdrekkaroyndir av skiparum og stýrimonnum á ferjunum, sigur formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum*

*Myndin er tilvildarliga vald*

– Ætlanin er at hava tólið um illgruni er um drykkjuskap. Við eini einfaldari roynd kunnu vit so fáa staðfest, ella avsanna ein illgruna. Tað er best fyri allar partar, tí so sleppa vit undan gitingum, segði hann.



# Fyrsta skotið í Vágum



*Durita Jacobsen, formaður í Felagskommununi í Vágum, skeyt fyrsta skotið vágamegin*

*Mynd: John Johannesen*

**Fyrsta skotið til undirsjóvartunnilin vágamegin varð latið av týsdagin. Formaðurin í Felagskommununi í Vágum trýsti á knøttin**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*á Reynsbakka*

Eitt buldur. So aftur eitt - og eitt aftrat. Og so var sum í Orminum Langa, at roykur stóð til skýggja upp. Men ikki litaðist Sundið reytt kortini, men var framvegis blátt og vakurt at síggja.

Tað koma fleiri innbodnir gestir í land av Ternuni á Oyrargjógv. Tað stendur ein bussur fyrin teimum, og skal flyta teir suður til inntakið suðuri á Reynsbakka, har fyrsta skotið til undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund skal skjótast Vágamegin.

Illa nokk eru buldrini frá tunnusláingini í gjár tagnað, áðrenn fólk aftur leggja til brots at hoyra fleiri brestir. Við arbeiðsvegin oman fyri Fútaklett er fólk á gongd. Vágafólk, sum fara suður at hygga at, tá skotið verður. Bussurin steðgar og tekur uppí. Og soleiðis heldur hann á, til fult er. So tey, sum fyrst fóru, noyðast at ganga, tí tey vóru komin ov langt, áðrenn bussurin kom.

Tað er nevniliga so, at ikki slepst suður til munnan við persónbilum. Bara hesin bussurin og onkur hendingur annar bilur við serligum loyvi sleppa suður eftir arbeiðsvegnum.

Og so hjálpir tað ikki, um ein er løgtingsmaður fyri Vágar. Tann, sum ikki er við bussinum, sleppur at ganga suður.

Fólkarúgvan veksur, alt meira verður komið suðureftir. Og suðuri við inntakið er væl av fólki savnað. Her eru bæði kommunalpolitikkarar úr Vágum, vágafólk annars og almennir gestir, sum komnir eru aðrastaðni frá til at vera við hesa løtuna.

Tó landspolitikkarar eru ongir at síggja, uttan annar vágatingmaðurin, sum ikki hevur verið í Tinginum í dag. Hin, sum var á tingfundi fyrrapartin, varð ov seinur og mátti bíða, til skotið var, tí løgreglan vildi ikki lata fólk ganga eftir vegnum, meðan vandi var fyri flúgvandi gróti. Aðrir løgtings- og landsstýrismenn vóru upptiknir av Brimli í Løgtinginum.

Nakað norðan fyri sjálvt boriplássið bíður stjórin í P/F Vágatunnlinu, Dávid Reinert Hansen, vælkomin, Hann sigur eitt sindur um gongdina í málinum.

Hann sigur millum annað, at skotið verður í grundini ein mánað fyrr, enn roknað varð við frá byrjan. Og tað kemst av, at vegarbeiðið, sum byggifelagið J&K Petersen stendur fyri, varð handað NCC, sum skal gera sjálvan tunnilin, ein mánað undan tíðarætlanini.

Síðan verður farið heilt oman at berginum, har arbeiðsleiðarin hjá NVV greiðir frá, hvussu løtt er, og hvussu ætlanin er at gera.

Her eru ongar máttur ella annað lagt fyri, so væntast kann, at skotið fer norður gjøgnum hagan ella eftir vegnum. Tí verða øll, sum saman eru komin, beind nakað væl niðan suður um sjálvt benið. Her skulu ikki takast nakrir kjansir.

Og tað hóvaði ikki myndamanninum, tí nú for møguleikin fyri at fáa eina mynd av sjálvum skotinum. Well, so er bara t royna tað næstbesta og vóna at fáa grótrok ella royk.

Formaðurin í Felagskommununi í Vágum, Durita Jacobsen, bygdarráðslimur í Miðvági, fekk tann heiður at trýsta á knøttin, sum loysti fyrsta skotið av.

Tá tað er gjørt, fer allur riðilin norður aftur eftir vegnum at síggja hvussu vorðið er. Nógv ganga og heinta sær steinar at hava til minnis um hendan dagin, eins og gjørt varð, tá fyrsta skotið varð latið av í Leynum í fjør.

Síðan bjóða vertirnir ein kaffimunn og smákøkur í arbeiðsskúrinum við inntakið, áðrenn alt fólkið heldur sína leið norður eftir arbeiðsvegnum aftur.

Summi við bussi og onnur til gongu. Bussurin við innbodnu gestunum heldur aftur á Oyrargjógv, meðan flestu av hinum, sum hava verið og hugt at, fara til bilar sínar, sum standa parkeraðir fram við landsvegnum oman fyri Fútaklett.



*Fyrsta skotið er júst latið av*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Fólk gjørdu útferð burtur úr degnum, og ein heitur kaffimunnur kom væl við*

*Mynd: Edvard Joensen*